**Semja millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið**

1. Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðarskeiðið 1.10.2013 til 1.10.2015.
2. Tann 1. oktober 2013 og tann 1. oktober 2014 hækkar lønin sambært hjáløgdu lønartalvum.
3. Tann 1. oktober 2013 hækka gjøldini fyri ólagaliga arbeiðstíð, soleiðis at upphæddirnar 23,95, 28,36, 31,51, 23,25 og 25,77 verða 24,31, 28,79, 31,99, 23,60 ávikavist 26,16. Sí talvu. Tann 1. oktober 2014 hækka hesi gjøld 1,9%.
   Broytingar í sáttmálateksti:
4. Í sáttmálanum verður hereftir brúkt heitið "starvsfólk" .
5. Í § 4 stk. 8 verða orðini "sambært avtalu um vaktargjøld o.a." strikað.
6. Í § 4 stk. 12 verða orðini "sambært avtalu um vaktargjøld o.a." strikað.
7. Í § 5 stk. 7 verður 250 broytt til 500 (prentvilla). Samstundis verður fyrsta regla í § 8 stk. 3 strikað.
8. Í § 5 verður stk. 2 soljóðandi: Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð eru ásett í talvu galdandi fyri henda sáttmála.
9. Í § 5 verður nýtt stk. 3 soljóðandi: Lønin verður ásett eftir tí áramálið, starvsfólk hevur arbeitt, 2 ár á hvørjum stigi.
10. Verandi stk. 5 í § 5 verður soljóðandi: Starvsfólk, sum sambært vaktarskipan hava tilkallivakt frá heiminum við skyldu at møta eftir boðsending, fáa ávíst vaktargjald eyka um tíman, sí lønartalvu. Tilkallivaktartímarnir kunnu verða afturbøttir við frítíð. Hvør vaktartími verður umroknaður til 20% av vanligum arbeiðstíma.
11. Eftir hetta gerast stykkini 3, 4, 5, 6 og 7 í § 5 til 4, 5, 6, 7 og 8 í § 5.
12. Í § 8 stk. 2 verður orðingin "sett sum bólkaleiðari" broytt til "sett sum bólkaleiðari ella arbeiðsfyriskipari".
13. Stykkini 2 til 5 í § 8 verða sett sum stykki 9 til 12 í § 5, meðan restin av § 8 verður strikað.
14. Í tað, sum tá er § 5 stk. 10, verður skoytt uppí: Frá 1. oktober 2014 kr. 11 eyka um tíman.
15. Í § 5 verður nýtt stk. 13 soljóðandi: Tá ið bólkaleiðari ella arbeiðsfyriskipari verður settur í starv, sum fevnir um ávísa vaktarskyldu ella ávísa telefonvakt, skal avtala verða gjørd um samsýning, upp í 1500 kr. um mánaðin, eftir setanarbroti.
16. Yvirskrivtin í § 6 og í (verandi) § 18 verður broytt til "Eftirlønargjald".

17. Í § 6 stk. 2 verður annar setningur soljóðandi: Arbeiðsgevarin rindar 11,5% í eftirlønargjaldi. Í sama stykki verður 2% broytt til 2,5%.
18. § 9 verður strikað, meðan teksturin í § 9 verður settur sum nýtt stk. 14 í § 5.
19. § 10 um sjúkrafráveru gerst § 8.
20. § 11 um arbeiðslistar gerst § 9.
21. § 11 a um fyribils tænastu gerst § 10.
22. Greinarnar 12 til og við 25 fáa eitt nummar, sum er 1 lægri enn tað verandi.
23. § 24 (áður 25) verður soljóðandi: Ósemja um at tulka sáttmálan verður at leggja fyri Fasta Gerðarrætt. Yvirskriftin verður "Gerðarrættur".
24. § 26 verður strikað.
25. Greinarnar 27 og 28 gerast 25 og 26.
26. Í verandi § 16, sum gerst § 15, verður viðmerkingin í stk. 2 strikað.
27. Í verandi § 17, sum gerst § 16, verður orðingin broytt til: ... §2, §3, §4, §5 tó ikki stk. 5, §11, §12 og §14.
28. Í verandi § 21, sum gerst § 20, verður tilvísingin 26 broytt til 25.
29. Í verandi § 27, sum gerst § 25, stk. 4, verða orðini "sum heild" strikað.
30. Í verandi § 28, sum gerst § 26, verða árstølini 2011 og 2013 broytt til 2013 ávikavist 2015.
31. Í § 19 (sum áður var § 20) verður stk. 2 flutt inn í § 1 sum nýtt stk. 2, meðan verandi stk. 2 í § 1 gerst stk. 3.
32. Í § 19 (sum áður var § 20) verður stk. 3 strikað, meðan teksturin verður settur inn í § 25 stk. 3.
33. Í § 25 stk. 1 (sum áður var § 27) verður talið 3 broytt til 5.

Sáttmálin er dagførdur og lønartalvurnar eru dagførdar eftir omanfyristandandi.

*Á Argjum 16. juli 2014*

*Havnar Arbeiðskvinnufelag* *Fíggjarmálaráðið*